MANGLENDE SIDER EFTER DETTE NUMMER

Ílatnar – til at verða úrlatnar

Orð: Justinus Eidesgaard
Myndir: Hilmar Jan Hansen
















Her prátaði vit við kvinnurnar aftaná framsýningina. Nummer tvey frá vinstru er Leila Petersen fyrrverkari. Tær seks aðrangyrtu eru frá vinstru Jutta Hansen, Jógerð Landsbjerg, Bergtóra Poulsen, Susan Højgård, Brynja Jacobsen og Unn Lassen

»Framlígt, óskyldugt og frekt,« soleiðis metir Bergtóra Poulsen úr Klaksvík tað at ganga modell í SMS. Hon gekk týsdagin saman við seks øðrum kvinnum modell í SMS og vísti fram tann seinasta mótan innan undirklæðir

Hóast vánaligar tíðir og fólk hava minni pening um hendur, so eru tað tiltøk í SMS, sum kunnu fáa fólk at savnast. Týsdagin var vármótaframsýning við tí seinasta innan kvinnuundirklæðir og torgið í SMS var stúgvandi fult av fólki.

Og her vórðu umboð fyri allar aldursbólkar, allar klassar, her var eitt breitt úrval av fólki, frá 0-90 ára aldur.

Og hvat er tað so sum dregur fólk til eina tílíka framsýning. Er tað undirklæðini ella tekkiligu kvinnurnar sum hálvnakinar sýna hesi fram?

Hjá mannfólkunum vit tosaðu við var ongin ivi. Tað lívgar upp at siggja vøkur konufólk, lítið flatin, í hesum annars so gráa og vælinnpakkaða vetrardegnum.

Og mannfólkið var væl umboðað. Við tráandi eygum fylgdu vit modellunum, meðan tær vaggandi, elegant, fluttu seg fram eftir pallinum. Hetta var eins professionelt og tað vit siggja í útlondum

Ein andans stríðsmaður stóð tætt við pallin, hvørja ferð ein hálvnakin kvinna kom framvið, so foldaði hann hendurnar og varrarnar gingu títtar. Um hann bað um ikki at falla í freistingar ella hann bað fyri kvinnunum, tað er ósvarað enn.

Biligar diddur

Onkur hevði hug at argast. Hetta vóru nakrar biligar gentur, sum soleiðis ganga og vísa sær fram á ein óneriligan hátt.

Tú kundi siggja á andlitunum á fólki sum argaðist. Men eg legði ikki merki til nakran, sum fór av framsýningini av hesum ávum. Fólk vórðu verandi til tann bitra enda,

Men fleiri viðmerkingar um kvinnurnar hoyrdust, eitt nú:

»Eg hevði so ongantíð gingið við til at min genta gekk nakin á einum palli.«, segði ein ljóshærdur unglingi.

»Kann nakar riða so lágt, at vísa seg fram á handan hátt.«, segði ein eldri kvinna og snerkti við.

»Tær munnu verða fullkomiliga tómar í ovastu hædd.», segði ein onnur pelsklædd.

Og so hoyrdust eisini positivar, eitt nú:

»Handan sær gott út, sjarmerandi og dugir at føra seg fram.« segði ein stoltur ungur sunnanmaður.

»Okkara kvinnur standa onki aftanfyri útlendskar á mótaframsýningum.« hoyrdist frá einum kendum lærara í Havn

»Fantastiskt, og so djarvar tær eru, at tær tora,« segði ein triði.

Ikki kroppurin men klæðir

Aftaná framsýningina hittu vit tær seks ungu kvinnurnar sum gingu modell. Vit prátaðu saman í Perluni. Nú vóru tær ílatnar og vit sótu róliga og prátaðu um tað at ganga modell.

Hvussu kenna tit tað at ganga hálvnaknar frammanfyri einari rúgvu av fólki?

»Vit hyggja omanfyri fólkið, vit siggja ikki tey einstøku, bert eina rúgvu av fólki, tað vil siga, at vit hava ikki so nógv samband við áskoðaran,« siga tær.

Skal ein ikki verða sera væl nøgdur við seg sjálvan, áðrenn ein fer hálvnakin á pall?

–Nei, tað er ikki so nógv kroppurin tað kemur ann uppá. Vit vísa ikki kroppin, men klæðir, sigur Súsanna Højgård, modell.

Er tað verri at ganga modell í undirklæðum?

–Ja, kroppurin er nakað persónligt, so tað er lættari at ganga í vanligum klæðum, sigur Bergtóra Poulsen, modell.

–Tá ongin annar toir, so meldar ein seg til, og so fáa vit pengar fyri tað, sigur Súsanna Højgård.

Hvat siga sjeikarnir?

Hvat siga so sjeikarnir hjá gentunum til at tær vísa fram undirklæðir?

–Drongurin hjá mær er stoltur av av. Hann hevur einki ímóti at eg gangi modell, sigur Jutta Hansen.

–Og mín sigur, at tað er nakað sum eg sjálv má avgera. Tað blandar hann seg ikki uppí, sigur ein onnur.

Droyma ikki um karrieru

Kundu tit hugsa tykkum at arbeitt sum modell uttanlands?

–Nei, tað er ikki nakað vit droyma um svara allar við ein munn.

–Vit verða uppfordraðar til at ganga modell og vit fáa pening fyri tað, men at havi hetta sum arbeiði, tað er ikki nakað vit droyma um, siga tær.

–Og hetta kundi eisini givið eitt sindur meir av peningi, eg haldi ikki at vit vinna nógv, sigur Súsanna Højgård.

–Vit hava tørv á einum modellburcau í Føroyum, og har kundi ein eisini lært, hvussu ein gongur modell, sigur Brynja Jacobsen.

Klaksviksingar meira tríbornir

Bergtóra Poulsen úr Klaksvík hevur fleiri ferðir gingið modell har.

–Eg haldi tað er lættari at ganga modell í Klaksvík. Serliga tá ein vísir undirklæðir fram. Har verður tað accepterað og aftaná fær ein herðaklapp fyri at hava sýnt seg fram, sigur Bergtóra Poulsen.

–Eg haldi, at tey flestu dáma væl at hyggja eftir okkum, hóast tey ikki tora at viðganga tað fyri øðrum, sigur Jógerð Landsbjerg.

Ikki toppleysar

Hvørji tit tora at gingi toppleysar, bert í trussun?

Her eru allar samdar, tað høvdu tær ikki gingið við til.

–Tá tú gongur toppleys, so hevur tað ikki nakað við eina mótaframsýning at gera, undirklæðir hoyra saman, siga tær.

Hvat er eitt gott publikum?

–Tað er gott um vit hoyra lógvabresitr. Eitt nú í dag, tað varð ikki klappað fyrr enn vit vóru lidnar. Stuttligari hevði verið um áskoðararnir høvdu verið meir við, siga tær.

–Tá vit høvdu fyrstu mótaframsýningina av undirklæðum 10. mars vóru mest mannfólk sum áskoðarar. Í dag var øvrvísi, nú vóru eisini nógv konufólk og hugdu.

–Hví skulu vit ikki vísa okkum fram. Eg haldi tað er framligt, óskyldugt og frekt. Tað er ikki líka mikið hvørjum undirklæðum ein er í. Viðhvørt eru vit ílatnar til at vera úrlatnar, sigur Bergtóra Poulsen

Undirklæðir burturav

Flykran í SMS er einasti handil í Føroyum, sum selur kvinnuundirklæðir burturav.

–Eg haldi, at tað er rímuligt, at vit sýna fram, hvussu klæðini siggja út á kvinnunum. Tað er ikki lætt at ímynda sær hvussu klæðini eru, um ein bert tekur tey av hyllunum, sigur Leila Petersen, sum skipaði fyri framsýningini av undirklæðum.

–Tað eru nógv mannfólk, sum keypa konuni ella gentuni undirklæðir sum gávu. og tað er lættari hjá teimu at vita hvat teir skulu keypa, um teir hava seð eina mótaframsýning, sigur Leila Petersen.

–Og báðar framsýningarnar hjá okkum hava prógvað at áhugin er stórur. Vit merkja tað eisini á spluni. Vit selja nógv meir aftaná eina mótaframsýning, sigur Leila Petersen

–Seinastu árini hava tað verið tær somu genturnar, sum hava gongið modell. Men hesuferð hava vit valt heilt nýggjar. Tað hevði verið ein fyrimunur, um vit høvdu havt eitt modellburcau í Føroyum, sigur Leila Petersen.

Og at enda ummæli av várframsýningini av undirklæðum í SMS: »Hon var framlig, óskyldug og frek.« » Meir av hasum slagnum, FLOTT, ELEGANT og føroyskt.«